**Skúlastýrisfundur**

Dato: 02.09.2014

Tíð: 17.15 – 19.15

Til staðar: Jórun Simonsen, Andrea á Rípuni, Elspa Petersen, Tummas Marni Joensen, Heri Müller, Turið Á Tórgarði og Høgni Warberg

Skrivari: Høgni Warberg

Skrá:

1. Góðkenna seinastu fundarfrásøgn
2. Heimasíðan
3. Evaluera summarhugnan
4. Trivnaðarkanning
5. Felags skúlastýrisfundur Kvívík og Vestmanna 9. sept. kl. 17 í Kvívík
6. Skúlakoyringin, er nakað nýtt?
7. Nýhugsan, Høgni setur nøkur orð á tað
8. Kunning frá skúlastjóra um lærarasamansetning o.a.
9. Foreldrafundur í heyst
10. Fíggjarætlan 2015
11. Ymiskt

Att 1: Fundarfrásøgnin varð góðkend

Att 2: Nýggja heimasíðan, www.kvivikarskuli.fo, var tikin í nýtslu pr. 1 september 2014. Heimasíðan er dagførd, og eins á gomlu heimasíðuni verður heimaarbeiði o.l. lagt út á vikuætlanina umvegis First Class. Leitifunksjónin er enn ikki á heimasíðuni, men Høgni fer í næstum at tosa við Heina um at fáa lagt eina leitifunksjón út á heimasíðuna.

Att: 3: Vit vóru øll samd um, at summarhugnin gekk avbera væl. Veðrið var sera gott, øll hugnaðu sær óført og fingu rørt seg, samstundis sum tey høvdu tað avbera stuttligt. Harumframt var nokk av køkum og góðum mati at grilla.

Att 4:  Høgni hevur onki frætt aftur frá skúlastjóranum í Miðvágs-sandavágs skúla viðvíkjandi trivnaðarkanning, so Høgni fer í næstum at spyrja eftir trivnaðarkanningini..

Att 5: Jórun fer at senda skúlastýrisforkvinnuni í Vestmanna skúla eina innbjóðan til felags skúlastýrisfund í Kvívíkar skúla týsdagin tann 16. september kl. 17.15.

Att 6: Nei, onki nýtt er viðvíkjandi skúlakoyringini.

Att: 7: Høgni setti nøkur orð á sínar tankar í samband við hugtakið nýhugsan. Hetta endaði við eini orðing, sum skúlastýrið kom ásamt um, skal verða partur av Virðisgrundarlagnum. Høgni setur hetta inn í virðisgrundarlagið og fær Heina at leggja tað út á heimasíðuna.

Att 8: Høgni kunnaði um lærarasamansetingina o.a. Tórarinn er komin aftur eftir 1. ára farloyvi og Súsanna er komin aftur eftir 4 ára farloyvi. Annars eru Turið, Hallgerð, Høgni og Herleif hevur nakrar tímar m.a. smíð. Gunnvá Dam hevur eisini tímar sum lesivegleiðari í Kvívíkar skúla.

Att 9: Felagsforeldrafundur, ið skúlastýrið skipar fyri, verður mikukvøldið 24. september kl. 18.30 – 21:00. Kl. 18:30 fer Jórun at hava ársfrágreiðing, kl. 18:45 fer Høgni at siga nøkur orð, kl: 19:00 verða foreldrafundir saman við flokslærararunum í teimum ymsu floksstovunum. Kl. 19:30 – 21:00 kemur Niclas Heri Jákupson at hava ein fyrilestur við heitinum "Tað góða lívið". Andrea og Turið koma við kaku til hetta tiltakið, og Høgni ornar fyri kaffi, the, koppum, tallerkum etc.

Att: 10: Høgni legði fram fíggjarætlanina fyri 2015. Einstakar viðmerkingar vóru til fíggjarætlanina, sum Høgni í næstum fer at leggja fyri kommununa.

Att: 11: Komandi skúlaár er ætlanin at byrja undirvísingina kl. 07:50 í staðin fyri kl. 8:00. Høvuðsorsøkin er, at so koma næmingarnir at hava longri fríkorter/matarsteðg, soleiðis at

skúladagurin gerst lættari hjá næmingunum. Høgni fer at leggja hesa ætlan fram fyri foreldrunum til felagsforeldrafundin tann 24. sept.

Høgni hevur tosað við Angeliu Jógvansdóttir um at hava skeið í pilates/cirkulvenjingum í Kvøldskúlanum. Angelia er áhugað í hesum, og seinni verður kunngjørt, hvussu tíðarætlanin o.a verður skipað í samband við hetta og onnur møgulig kvøldskúlaskeið í vetur.

Kvøldskúlaskeiðið í møblapolstring verður útbjóðað aftur komandi vetur, treytað av at kvøldskúlin vil keypa amboðini frá undirvísaranum.

Vegna skúlastýrið
Høgni Warberg, Skrivari